## Undirskriva samanlegging





*Jógvan Thomsen, borgarstjóri í Nólsoy og Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn, fara í kvøld at skriva undir endaligu komunusamanleggingina*

**Tórshavnar og Nólsoyar kommunur fara í kvøld at skriva undir endaligu kommunusamanleggingina**

KOMMUNUSAMAN LEGGING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Nólsoyar Kommuna og Tórshavnar Kommuna fara nú hvør í sínum lagi at halda fund um kommunusamanleggingina, sum nólsoyingar samtyktu á fólkaatkvøðu um vikuskiftið.

Í Nólsoy heldur kommunan eyka týskvøldið, meðan Tórshavnar býráð heldur eyka býráðsfund í kvøld, mikukvøld. Á báðum fundum verður støða tikin til uppskotið um samanlegging av Nólsoyar og Tórshavnar kommunum.

Bygdarráðsfundurin í Nólsoy týskvøldið var kl 19:30, meðan fundurin í Havn í kvøld verður kl 19.

Eftir býráðsfundin í Havn verður sáttmálin um samanleggingina undirskrivaður í býráðssalinum í Havn.

## Telefonstormur á Hotel Føroyar um Kandis

**Tá Sosialurin kom á handilshillarnar mánadagin seinnapart og ÚF-sendingin Hvat nú? hjá Elis Poulsen eisini fór í luftina, gjørdist rættiligur telefonstormur á Hotel Føroyum**



TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Orsøkin var, at í bæði blað og sending varð boðað frá, at kendi danski bólkurin Kandis kemur á vitjan í mai og spælir á Hotel Føroyum.

Á Hotel Føroyum verður upplýst, at eftir stuttari tíð vórðu eini 200 atgongumerki seld, eftir at Sosialurin og Hvat Nú? bóru tíðindini um, at Kandis spæla á Hotel Føroyum tann 7. mai í ár.

Bólkurin er hin fremsti innan dansitónleik í Danmark og er eisini kendur í grannalondunum og sjálvandi eisini í Føroyum.

Eittans kvøld spæla teir á ferðini til Føroya, nevniliga 7. mai. Longu kvøldið eftir eru teir aftur á palli í Danmark og søgur siga, at bólkurin, sum er stovnður í 1989, hevur eina spæliskrá, ið upptekur teir eini 4 ár framyvir.

Umframt góðan dans á Hotel Føroyum 7. mai, so verður eisini búgvið borð og m.a. verður oksakjøt úr Koltri at fáa.

Enn ber til at ogna sær atgongumerki til stóra kvøldið á Hotel Føroyum.

## Laksaprísurin farin væl upp um 20 kr kilo

**Støddin á príshækkingini á laksi verður avgerandi fyri, hvussu nógv laksútflutningsvirðið minkar í ár. Verður príusin oman fyri 24 kr kilo, væntast útflutningurin »bert« at minka við 100 mió kr**

ALIVINNA
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Hækkingin í laksaprísinum kann bøta um afturgongdina í alivinnnuni. Heldur prísurin sær á 20 kr/kg, verður afturgongdin 200 mió kr. Men fer prísurin upp um 24 kr/kg, minkar afturgongdin til 100 mió…*

Nú hómast glottar í alivinnuni – og føroyskir alar tjena aftur pengar.

Vinnuhúsið skrivar á heimasíðu síni, www.industry.fo, at prísurin fyri tær góðu støddirnar í síðstu viku var væl oman fyri 20 kr kilo. Sambært Vinnuhúsinum merkir hetta, at alivinnan nú aftur kastar av sær.

– Prísútlitini fyri tær næstu vikurnar eru eisini, at prísirnir fara at hækka enn meira. Kanska er tað nú, at marknaðurin vendir, verður sagt frá Vinnuhúsinum.

Alivinnan er í svárari kreppu, og tað er tí kærkomið, at prísurin sær út til at hækka. Í síðstu viku var prísurin so mikið høgur, at alarar hava tjent pening. Tað er langt síðani síðst, at so var. Eisini er væntandi, at prísurin hesa vikuna fer at hækka enn meira.

Orsøkin til prísvøksturin er, at útboðið ikki er so stórt sum tað hevur verið. Norska alifelagið FHL sigur, at tøkan í Norra í ár verður 6% minni av laksi og heili 30% á sílum. Hetta vil allarhelst føra við sær, at prísurin verður á einari hægri legu í ár, og alivinnan fer tí aftur at kasta av sær.

– Hetta fer at merkja, at alarar aftur fáa dirvi til at halda fram og tí kann væntast, at smolt verður sett á sjógv í ár. Kanska ikki her í vár, men í heyst. Um prísurin verður sum nú, kann kreppan í alivinnuni varða styttri enn vænta. Um so er, at væl av smolti verður sett á sjógv í heyst minkar tøkan og útflutningurin av alifiski bara í ár og næsta ár, meðan tøkan í 2006 aftur fer at vaksa, sigur Vinnuhúsið.

Tøkan í ár verður góð 30.000 tons og um mett verður, at prísurin verður nakað oman fyri 20 kr/kg minkar útflutningurin á laksi kanska við 200 mió. kr. Um so verður at prísurin verður 24 kr/kg minkar útflutningurin bert við 100 mio. kr. Sostatt er støddin á príshækkingin avgerandi fyri, hvussu fellið verður í útflutninginum.

Sølan í 2005 verður tó væl lægri, tí ov lítið varð sett á sjógv seinasta ár.

Útflutningurin í 2005 verður sostatt væl lægri, men um alivinnan setir smolt á sjógv í ár fer alivinnan aftur at vaksa í 2006.

## Barnakórstevnan í Sørvági fríggjadagin

**Fríggjadagin komandi verður árliga barnakórstevnan í høllini í Sørvágs skúla**

BARNAKÓRSTEVNA
*Tíðindaskriv*



*Fleiri enn 200 børn er teknað til barnakórstevnuna, sum verður í Sørvági fríggjadagin*

Tilmeldað eru nakað oman fyri 200 børn úr ymsum skúlum kring landið. Tað, sum sungið verður hesaferð eru sangirnir úr Loppugrasi eftir Sólrun Michelsen og Paula Hansen.

Barnakórstevnan hevur nú fimm ár á baki. Fyrstu ferð, hon varð hildin, var í Lærarаskúlahøllini. Síðani hevur hon verið hildin í ítróttarhøllini á Kambsdali, í Fríðrikskirkjuni á Toftum, aftur í Lærarаskúlahøllini í fjør og nú í Sørvági.

Føroya Sanglærarafelag og Landsmiðstøðin (LMS) hava staðið fyri hesum tiltaki farnu árini, og eini 1200-1300 børn hava luttikið tilsamans.

Í ár er samarbeiðið víðkað, soleiðis at umframt Sanglærarafelagið og LMS er eisini Tórshavnar Musikkskúli við og lata tey tónleikarar til tiltakið. Eitt evningshold í Eystursкúlanum hevur málað stórar myndir til sangirnar, og Sørvágs skúli stendur fyri øllum tí praktiska, og harumframt syrgja tey fyri musikalskum undirhaldi fyri børnunum, tá ið steðgur er millum venjingarnar. Sum sæst, eru nógv fólk við í fyrireikingunum.

Tað er Joanna Johansen, ið stjórnar barnakórinum í ár. Konsertin, sum er ókeypis, er kl. 16 fríggjadagin 26. mars í høllini í Sørvágs skúla.

– Vónandi møta fólk líka væl upp til konsertina, sum tey hava gjørt hini árini, siga fyrireikararnir.

## Karaoke og DJ-show í Sørvági

**Leygarkvøldið verður kvøldið fyri tey ungu í Sørvágs Bio**

UNDIRHALD
*Tíðindaskriv*

Aftan á eitt sera væleydnað kvøld í Virkinum á Sandi gongur leiðin vestur til Vágar.

Tað snýr seg um karaoke-kvøldið og dj-showið, sum seinasta vikuskiftið var á sandi. Komandi leygarkvøld verður tiltakið í Sørvágs Bio.

– Tey ungu í Vágoynni kunnu sostatt gleða seg til eitt sera stuttligt kvøld, har tey sjálv vera beinleiðis partur av undirhaldinum, sigur Mark Joensen, fyrireikari.

Hann sigur, at tey ungu fáa nevniliga møguleikan at koma upp á pallin at syngja ein góðan og við stuðli frá áskoðarunum sum fylgja við á stórskýggja.

– DJ-Switch, sum nú hevur sligið seg fastan sum besti DJ-scratcharin í Føroyum, stendur fyri tónleikinum. Hann dugur sera væl at velja tónleik, ið fjøldini dámar, og afturat tí er hann ein snillingur tá ið tað snýr seg um at »scratcha«.

Mark Joensen sigur, at sum nakað nýtt verður skipað fyri busssambandið út Havn vestur til Sørvágs, og er túrurin til Sørvágs Bio og aftur til Havnar ókeypis um nóg nógv tekna seg.

Tað er Jákup Jacobsen sum verður frásøgumaður.



# Altjóða granskingarlið til Sands

**Forngrevsturin á Sandi er so áhugaverdur, at ætlanin er at fáa útlendskar granskarar hendavegin í summar at kanna fornu búsetingarnar saman við okkum, sigur Símun V. Arge, fornfrøðingur**

SØGA
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*



*Símun V. Arge, savnsvørður á Føroya Fornminnissavni, hevur verið við til nógvar rannsóknir í bakkanum við kirkjuna á Sandi*

Seinasta summar var eitt altjóða granskingarlið á Sandi fyri at kanna fornu fláirnar, ið vóru funnar undir bakkanum við kirkjuna í bygdini fyri nøkrum árum síðan. Fláirnar, ið stava frá búseting, eru upp til tveir metrar tjúkkar, og í teimum finnast eitt nú væl varðveitt bein av djóri. Tær stava frá fyrstu víkingatíðini, tvs. umleið ár 800 til umleið ár 1100-1200.

– Beinini, ið vit funnu í fláunum, vóru sera val varðveitt, og tað er sera sjáldsamt, sigur Símun V. Arge, savnsvørður á Føroya Fornminnissavni.

Hann vísir á, at talan er um bæði fuglabein, bein av neyti og fiskabein. Harumframt vóru bein av grísi funnin, og tað í sær sjálvum er áhugavert, metir Símun V. Arge.

Hann kom í samband við eina stóra bretska náttúrufrøðiliga verkætlan, ið nú umfatar bæði Føroyar, Ísland og Grønland.

Her var føroyska tilfarið mett at vera so áhugavert, at ein amerikanskur serfrøðingur, Tom McGovern úr New York, kom til Føroya síðsta summar, saman við øðrum, at gera kanningar.

### Ótu fugl

Fyribilsúrslitini frá kanningunum seinasta summar benda á, at føroyingar hava etið nógvan fugl, bæði lunda og lomviga. Eisini hava forfedrarnir etið tosk, men eisini laks og síl.

Kanningarnar av fláunum vísa, at svín vóru í Sandoynni tá á døgum. Tað áhugaverda í hesum sambandi er, vísir Símun V. Arge á, er at tey hava verið í oynni í eitt langt tíðarskeið. Í útnorði hevur annars verið vanligt, at svínini komu við landnámsfólkunum, men at tey síðan hvurvu skjótt aftur.

### Halda fram

Kanningarnar síðsta summar vóru forkanningar, og skulu eftir ætlan vera grundarlagið undir størri rannsóknum.

Símun V. Arge vísir á, at eitt øki uppá umleið 80 metrar fram við bakkanum er rættuliga áhugavert, og at talan tilsamans er um umleið 6-7000 fermetrar stórt øki, ið eigur at kannast nærri.

Skulu rannsøknirnar halda fram í summar krevur tað fígging, og í løtuni verður arbeitt við at fáa amerikanska og bretska fígging til at halda fram, sigur Símun V. Arge.

Tiverri er ikki gjørligt at fremja fornfrøðiligar rannsóknir í Føroyum, sum eru fíggjaðar av tí almenna, staðfestir Símun V. Arge.

Økið við kirkjuna á Sandi er so áhugavert, at fornfrøðingurin sær fyri sær eina stóra rannsøkn, og eitt tvørvísundaligt samstarv, ið eigur at fevna um næstu 3-5 árini.

# Spennandi útgrevstur

**Eitt tað mest áhugaverda fornfrøðiliga granskingarumhvørv ið í landinum er á Sandi. Undir Junkarinsfløtti og undir Breytasandi eru funnir fleiri lutir frá fornari búseting. Aftur í summar koma útlendsk vísindafólk væntandi at kanna fláirnar við kirkjuna heima á Sandi**

SØGA
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Líka síðan 1863 hevur økið við kirkjuna á Sandi havt stóran søguligan áhuga. Ta árið vóru nevniliga funnar 98 silvurmyntir, ið stavaðu frá 11. øld, við kirkjuna. Onga aðrastaðni í landinum eru líknandi myntir funnar.

Í 1970 varð farið undir at gera rannsøknir í og undir kirkjuni á Sandi, og tær vístu, at fimm kirkjur hava áður staðið har, ið verandi kirkja, sum er bygd í 1839, nú stendur. Kirkjurnar hava staðið júst á sama stað, og tann elsta, sum var ein lítil timburkirkja, varð bygd einaferð í 11. øld. Rannsøknirnar góvu eina vitan um, hvussu føroyska bygdarkirkjan hevur útviklað seg frá fyrstu kristnu tíðini til okkara tíð.

Úr gamlari tíð var vanligt, at kirkjan stóð millum húsini í bygdini, men so er ikki á Sandi, har kirkjan stendur rættuliga einsamøll.

Hetta fekk fornfrøðingar at ivast í, hvørt ein býlingur ikki mundi hava ligið har á staðnum frá fornari tíð.

Síðan sjeytiárini hava rannsøknir verið gjørdar í økinum við kirkjugarðin á Sandi, ið hava givið fleiri áhugaverd úrslit. Seinnu árini hava kanningar verið gjørdar av bakkanum, norður frá kirkjuni.

### Forn búseting

Kanningarnar geva greiðar ábendingar um víkingaaldarbúseting við kirkjuna á Sandi. Eisini eru 11 fornar gravir funnar við fleiri áhugaverdum gripum, so sum knívar, ringar, blýlodd og ein arabisk silvurmynt. Myntin er tann fyrsta av sínum slag, ið er funnin í Føroyum. Hon er tíðarfest onkunstaðni millum ár 747 og 771 eftir kristi føðing, og stavar antin frá Irak ella Norðurafrika, á leið har Tunis liggur í dag. Og serfrøðingar meta, at myntin er komin í grøvina heima á Sandi umleið ár 850-900. Tó kunnu serfrøðingar ikki heilt útihýsa møguleikanum fyri, at talan er um eina eftirgerð, ið er umleið 100-120 ár yngri.

Ein tann mest áhugaverdi gripurin er eitt spenni ella brosja úr bronsu, ið var funnin í eini av fláunum undir Junkarinsfløtti. Nærmasta, ein kemur nøkrum líknandi, er í nøkrum víkingagrøvum í Íslandi, har tey spennini eru tíðarfest til 10. øld. Annars eru tílík spenni sum so ikki at finna í Norðurlondum, men stava helst úr baltisku londunum.

Í nítiárunum vóru gjørdar sonevndar fosfatkanningar, ið góvu ábendingar um umfatandi búseting í lendinum við Junkarinsfløtti.

Tá bakkin her skrædnaði, summarið 2000, gjørdi Føroya Fornminnissavn eina skráseting, ið staðfesti, at tær niðastu bústaðarleivdirnar í Junkarinsfløtti stava heilt aftur frá umleið ár 800.

Sostætt eru hesar elstu fornfrøðiligu leivdir, ið staðfestar eru í Føroyum. Harumframt er líkt til, at forna búsetingin ikki er órógvað av seinni bygging á staðnum, og tí verður økið, bæði søguliga og fornfrøðiliga, mett til eitt tað mest áhugaverda fornrannsóknar og tvørfrøðiliga granskingarøki í Føroyum.



*Umleið 100 fólk vóru til kunnandi fundi á Sandi fríggjakvøldið, har greitt varð frá um fornfrøðiligu virðini við kirkjuna í bygdini, og ætlaninar um at fáa fleiri ferðafólk í oynna.*

# Søguslóðir í Sandoynni

**Ferðaráðið og Fornminnissavnið eru farin undir eina felags verkætlan, ið skal gera Sandoy, Skúvoy og Dímun meira sjónligar. Ætlanin byggir á fornfrøðiligu virðini og føroyingasøgu**

FERÐAVINNA
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Føroyingasøga, fornlutir, frásøgnir og náttúran eru grundarsteinar undir verkætlanini, ið Ferðaráð Føroya og Føroya Fornminnissavn eru farin undir, og sum tekur støði í Sandoy, Skúvoy og Dímun.

Verkætlanin, ið er partur av eini felags norðurlendskari og ES-verkætlan, ber heitið »Søguslóðir – søgur og frásøgnir«, á enskum »Destination Viking – Saga Lands – Sagas & Storytelling«.

### Skelting

Ætlanin er at gera sonevndar søguleiðir, bæði fyri føroyingar og útlendska ferðamannin. Túrar, har greitt verður frá søgu, har gomlu sagnirnar verða knýttar uppí, og har komið verður inn á føroysku mentanina.

Ætlanin er at gera túrar eftir gomlu varðagøtunum í Sandoynni, skipast skal fyri túrum til Skúvoyar og til vestursíðuna av Sandoynni og eisini skal skipast fyri frásøgutúrum, har greitt verður frá funnu fornlutunum við kirkjuna á Sandi.

Í hesum sambandi ætla Ferðaráðið og Fornminnissavnið, saman við Náttúrugripasavninum, at skipa fyri umfatandi skelting í Sandoynni.

Tá komið verður í land av Teistanum í Skopun, skal eitt stórt skelti greiða frá oynni og hvat hon hevur at bjóða og í hvørjari bygd skulu bygdatalvur setast upp. Eisini skulu skelti greiða frá gomlu bygdagøtunum, tvær søguligar talvur, har millum annað greitt verður frá fornfrøðiligur virðunum við kirkjuna á Sandi, skulu setast upp, og til seinast skulu 12 søgu- og náttúruskelti setast upp. Hesi seinastu skulu hvør sær fortelja eina søgu um eitthvørt áhugavert har á staðnum.

Harumframt skulu faldarar gerast, umframt at peningur skal nýtast til marknaðarføring. Ætlanin er at ein samskipari skal taka sær av uppgávuni í tríggjar mánaðir.

Seinasta fríggjadag varð ætlanin løgd fyri umboð fyri kommunurnar í Sandoynni, og um kvøldið varð almennur fundur á Sandi, ið snúði seg um forna útgrevsturin við kirkjuna og um ætlaninar at fáa fleiri vitjandi í oynna.

### Fígging

Samlaði kostnaðurin av skeltingini er 812.000 krónur. Leysliga mett letur felags norðurlendska og ES-verkætlanin 120.000 krónur, Landsverkfrøðingurin letur rammurnar til skeltini, ið hava virði uppá umleið 50.000 krónur, og ætlandi skulu kommunurnar í Sandoynni bera tilsamans útvið 150.000 til skelting osv. Sostætt mangla framvegis umleið 500.000 krónur, til øll skeltingin skal gerast veruleiki.

Birita Nolsø, ið hevur samskipað ætlanina vegna Ferðaráðið, hevur vónir um at tað fer at eydnast at fáa fígging til vega. Í næstum verður søkt um pengar úr ymsum grunnum og frá felagsskapum, og síðan verður farið til verka.

Ætlanin er at hava øll skelti klár og sett upp á vári næsta ár. Eisini arbeiða Ferðaráðið og Fornminnissavnið, saman við fólki á staðnum, við ætlanum um at kveikja lív í aftur frásøgukynstrið, har fólk á staðnum at greiða frá søgum haðani.